# Harley jubileumsmodell við ABS




**Í sambandi við at Harley Davidson hava 105 ára jubileum í ár, koma fleiri spennandi nýggheitir á marknaðin. Eitt nú hava fleiri av modellunum ABS-bremsur og eru lakkeraðar í serligum litum**

MC

Í ár eru liðin 105 ár síðan fyrstu ameikansku Harley Davidson motorsúkklurnar komu á marknaðin. Tað vóru Arthur Davidson og Bill Harley, ið stovnaðu Harley Davidson motorsúkkluverksmiðjuna í Milwaukee í Wisconsin í USA í 1903. Í hesum sambandi hevur verksmiðjan gjørt fleiri jubileumsmodell, sum eisini koma til Evropa.

Ein av hesum nýggjheitum er Cross Bones (o´l school cruiser) og fleiri onnur modell við t.d. ABS-bremsum, »slipp-smooth« koblingum, elektroniskum spitara (uttan kápil) og størri motori á V-rod modellunum. Súkklurnar eru í serligum jubileumslitum við 105 ár logo og verða gjørdar í avmarkaðum nøgdum.

Síðan 2005 hava blokeringsfríar ABS-bremsur verið standard á øllum Harley Davidson politimotorsúkklunum, sum verða nýttar í meira enn 3.000 politidistriktum í USA. Tá tað snýr seg um at hava fult tamarhald á súkkluni undir øllum umstøðum, geva ABS-bremsurnar føraranum ein serligan tryggleika, eisini við harðar uppbremsingar. Fleiri av nýggju modellunum fáast nú við ABS.

Vatnkøldi V2 (4-takt) motorurin á Harley V-Rod, sum er gjørdur av Porsche, er nú upp á 1.250 ccm og hevur 125 hk við 8.250 snún/min. við ABS bremsum.

Tað er HD.fo sum umboða Harley Davidson í Føroyum, og tað hevur eydnast teimum at fatur í einari 105 ára jubileumssúkklu í Softail Custom útgávuni. Annars eru longu fleiri súkklur av 2008 modellunum á goymslu hjá HD.fo í Jónas Broncksgøtu, sum t.d. sportster XL-1200 Nightster, Buell XR og V-rod.

Ove Ritter frá HD.fo sigur, at tey nógv eftirspurdu softail Rocker modellini koma á evropeiska marknaðin í mars, og teir fáa eina av allarfyrstu súkklunum til sølu í Føroyum.

Meira á heimasíðuni: www.HD.fo og www.H-D.com

mg



*Harley Davidson V-Rod við ABS-bremsum (prísur kr. 252.000,-)*







*Harley Davidson Softail Custom jubileumsmodell (prísur kr. 249.275,-)*

# Mondeo ársins familjubilur

Top Gear hava valt Ford Mondeo sum „Family Car of the Year 2007“. Hetta hendi undir presentatiónini av teirra árliga „Awardshowi“.

Kendi motorjournalisturin Jeremy Clarkson og starvsfelagar hansara vóru samdir um, at Ford Mondeo er ein praktiskur, væl koyrandi bilur við sera góðum koyrieginleikum og ein virðiligur vinnari av heitinum „Family Car of the Year 2007“.




*Top Gear hava valt Ford Mondeo sum „Family Car of the Year 2007“*